# Toftamenn tóku stigini



**SVANGASKARÐ**

*Dysturin á Svangaskarði mánakvøldið millum B68 og ÍF var ikki av teimum bestu, men B68 var nærri at skora til 2-0, enn ÍF var at javna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VODAFONEDEILDIN** Eysturoyaruppgerðin mánakvøldið endaði við, at B68 vann tepran heimasigur á ÍF

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| B68 | 1 |
| ÍF | 0 |

Tað var ikki tað stóra veiggið í dystinum á Svangaskarði mánakvøldið, tá B68 og ÍF hittust í fimtu uppgerðini í triðja umfari. Sum heild rakk spælið ikki hæddirnar, men toftamenn høvdu tó munin, so 1-0 sigurin var uppiborin.

Málið kom longu eftir eitt korter, tá Keita fekk sent innfyri úr høgru, hóast hann var umringaður av einum fýra fuglfirðingum. Inni fyri málinum kom André Olsen stormandi og høgdi til, so bólturin sang í netmeskunum aftan fyri Jákup Mikkelsen, ið ongan møguleika hevði at verja fyri.

Keita og Ndende vóru annars sera sjónskir á B68-liðnum, sum hesa ferð hevði nógvar unga toftamenn við. Og gjøgnumgangandi fyri dystin var eisini, at B68 var nógv nærri at økja til 2-0, enn ÍF var til at javna.

Stutt inn í seinna hálvleik kom Rógvi Jacobsen á vøllin, men tað bøtti ikki stórvegis um spælið hjá ÍF, sum nú fyri tað nógva gjørdist bóltlossing fram ímóti B68-brotsteiginum, uttan at Rógvi tó fekk nakað burturúr.



Yvirhøvur vóru ikki teir stóru og nógvu málmøguleikarnir í dystinum, sum fyri B68 merkti, at liðið eftir trý umfør er triðfremst í Vodafonedeildini við seks stigum, meðan ÍF eftir tapið er á sætta plássi við fýra stigum.

hilmarjan@sosialurin.fo

## Kavin spøkir enn

**FÓTBÓLTUR** Hóast vøllirnir aftur eru grønir, so sæst framvegis væl á spælinum, at venjingin og fyrireikingin til fótbóltskappingina hevur verið nógv darvað av kava

Hilmar Jan Hansen

Trý umfør eru avgreidd í fótbóltslandskappingini, og stigatalvan sær kanska ikki heilt soleiðis út, sum kundi roknast við. Mest óvæntað tykist plaseringin hjá NSÍ at vera – eitt stig og tvey skorað mál í tveimum dystum á heimavølli og einum á útivølli – er væl minni, enn tað undan kappingarbyrjan var roknað við, at NSÍ fór at megna.

Eitt sindur óvæntað er tað eisini, at B36 skal vera oddalið við fullum sigatali. Tað eru átta stig millum B36 og NSÍ, og tað kann væl vera, at munurin verður uppaftur størri, tá ið fjórða umfar er spælt, nú avbjóðingin hjá NSÍ kennist verða størri enn tann hjá B36. Árstalsfelagið sleppur ikki undan at vera favorittur á Argjum, meðan uppgávan kennist vera stór hjá NSÍ, sum skal spæla í Gundadali ímóti HB.

Meistararnir í HB hava ikki verið so ógvuliga sannførandi. Men hóast talan higartil bara hevur verið um tveir javnleikir og ein sigur, so er HB ikki longur enn fýra stig frá toppinum, og tað kann vera so skjótt, at HB er millum toppliðini. Eftir venjaraskiftið og eftir at fleiri nýggir verjuspælarar eru komnir aftrat, verður leitað eftir javnvágini millum álop og verju. Higartil tykist hon vera treytað av, um Fróði Benjaminsen er í miðverjuni ella á miðvøllinum.

Av teimum fimtan dystunum higartil eru seks endaðir við heimasigri, fimm við javnleiki og fýra við útisigrum. Í fyrsta umfari vóru 27 mál skorað. Í øðrum umfari vóru málini 14 í tali, og triðja umfar var uppaftur meiri málfátækt – bara 11 mál.

Fótbóltsspælið hevur higartil ikki verið nakað at reypað av. Ein av orsøkunum man vera, at venjingarnar so leingi vóru darvaðar av nógvum kava. Bóltkenslan er ikki enn blivin nóg góð, men tað man fara at batna, nú várið av álvara kennist í luftini.

hilmarjan@sosialurin.fo

### B68-ÍF 1-0 (0-0)

**1-0: André Olsen, 16.**

Dómari: Eiler Rasmussen

**B68:** Vlada Filipovic – Poul N. Poulsen, Oddur Højgaard, Jóhan Dávur Højgaard, Dánjal Pauli Højgaard – Niklas Joensen (Kristian Anton Andreasen, 56.), Ndende Adamu Gueye, Remi Langgaard, André Olsen (Niklas Poulsen, 90.), Øssur Hansen (Eli Simonsen, 75.) – Ahmed Keita

**ÍF:** Jákup Mikkelsen – Uni Reinert Petersen (Rógvi Jacobsen, 51.), Poul Ennigarð, Kaj Ennigarð, Høgni Zachariasen – Fritleif í Lambanum, Karl Løkin, Alexander Jovevic, Andy Olsen – Nenad Saric, Øssur Dalbúð (Dánjal á Lakjuni, 70.)




## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 3 | 3 | 0 | 0 | 8 | 2 | +6 | 9 |
| 2 | Víkingur | 3 | 2 | 1 | 0 | 7 | 3 | +4 | 7 |
| 3 | B68 | 3 | 2 | 0 | 1 | 7 | 3 | +4 | 6 |
| 4 | HB | 3 | 1 | 2 | 0 | 6 | 5 | +1 | 5 |
| 5 | EB/Streymur | 3 | 1 | 1 | 1 | 4 | 3 | +1 | 4 |
| 6 | ÍF | 3 | 1 | 1 | 1 | 3 | 3 | 0 | 4 |
| 7 | FC Suðuroy | 3 | 0 | 2 | 1 | 5 | 7 | -2 | 2 |
| 8 | AB | 3 | 0 | 1 | 2 | 7 | 10 | -3 | 1 |
| 9 | NSÍ | 3 | 0 | 1 | 2 | 2 | 5 | -3 | 1 |
| 10 | B71 | 3 | 0 | 1 | 2 | 3 | 11 | -8 | 1 |